Tvey daga skeið fyri teg, sum leiðir uttan
at hava formella leiðarabyrgd

# At leiða onnur uttan at vera leiðari

Menn tín
fakliga
profil



- **Hvat er góð leiðsla – og hvør leiðsluháttur hóskar best til tín?**
- **Soleiðis eyðmerkir og lyftir tú einstaklinga styrkir og førleikar hjá starvsfeløgum**
- **Lær at handfara "truplar" persónar í dagliga arbeiðnum**
- **Leiðslusamskifti – soleiðis skapar tú eldhuga og jaligan framdrátt hjá øðrum**

"Tá ið eg hyggi eftir tí, ið eg ynskti mær av skeiðnum, og eg hyggi at tí, sum eg fekk við mær heim, so kundi eg ikki hava ynskt mær meira innihald ..... tað var gott"

Skeiðið er eitt samstarv millum Synergi & Confex

i Confex

Synergi

## Lær at leiða onnur, sjálvt um tú ikki ert leiðari

Hetta skeið er ment til tín, sum leiðir onnur, tó uttan at vera settur sum formellur leiðari. Tú situr kanska í einum sessi sum verkætlanarleiðari, hevur ábyrgdina fyri einum serligum arbeiðsbólki ella øðrum bólki, hevur ábyrgdina fyri yvirskipaðum samskifti, ella kanska ert tú tann í deildini, sum fer inn fyri leiðaran sum avloysari, tá ið tað er neyðugt.

**Faklig vitan og ítøkilig amboð**
Gjøgnum tveir læruríkar skeiðsdagar fært tú gjøgnum fakliga vitan og ítøkilig amboð eitt haldgott tak um persónligu leiðsluna.

- Tú styrkir fakligu vitanina, soleiðis at tú verður ein betri leiðari í tí tú gert
- Tú fært vitan og amboð til, hvussu tú leiðir og motiverar fólk
- Tú lærir, hvussu tú tillagar títt samskifti til ymiskar støður og til ymiskar typur
- Tú fært amboðini at handfara mótvilja ella ein "truplan" starvsfelaga
- Tú lærir, hvussu tú skapar eldhuga og fær fólk at kenna, at tey "eiga" málini
- Tú lærir, hvussu tú kann fáa autoritet uttan at tú formelt hevur tað á pappírinum – og uttan at starvsfelagar taka hetta negativt

**Melda teg til longu í dag** á www.synergi.fo. Tú kanst eisini ringja ella senda okkum ein teldupost. Hevur tú spurningar ert tú vælkomin at seta teg í samband við Anniku ella Ásu hjá Synergi á tel. 322 355 ella umvegis teldupost til synergi@synergi.fo.

**Vælkomin á skeiðið!**

Blíðar heilsanir

Synergi í samstarvi við Confex Danmark A/S

Melda 3 til og fá 10% í avsláttur

**Hava tit tørv á einum skeiðið innanhýsis á tykkara arbeiðsplássi** ella einum spennandi degi við kompetentum fyrilestrarhaldarum? Setið tykkum í samband við Ásu ella Anniku á tel. 322 355 og hoyr nærri hvat vit hava at bjóða.

# SKRÁ

## DAGUR 1

08.30 Skráseting og morgunbreyð við kaffi/te

09.00 Vælkomin v/Synergi

### Menn tín fakliga profil sum leiðari

- Hvat eyðmerkir ein góðan leiðara?
- Hvørjar styrkir og hvørjar veikleikar hevur tú í leiðslu?
- Soleiðis mennir tú teg at gerast ein góður leiðari

### At leiða og býta út arbeiði, hóast tú ikki ert leiðari - soleiðis ført tú tingini at henda!

- Soleiðis brúkar tú samskifti at vera hoyrd/-ur, sædd/-ur og lagd/-ur til merkis!
- Grundarsteinarnir í leiðslu – mest týðandi økini hjá tær at seta fokus á
- Soleiðis gevur tú greiðar afturmeldingar - feedback - til starvsfelagar og leiðarar

### Visiónir og mál – soleiðis gert tú!

- Soleiðis setir tú mál – og soleiðis náa tit teimum
- Soleiðis setir tú mál fyri bólkin hjá tær
- Soleiðis setir tú mál fyri hvønn einstakan
- Lær at skapa eldhuga og at fáa fólk at "eiga" málini

### Soleiðis setir tú saman vælvirkandi bólkar - teams

- Hvat kanst tú gera framman-undan fyri at tryggja samstarvið?
- Soleiðis setir tú bólkin saman og skapar eina succesfulla eind
- Hvat skalt tú gera fyri at fáa eitt gott samstarvsumhvørvi við opinleika og góðum samskifti
- Bólkasálarfrøði – hvørji eru menningarstigini í einum bólki

### Soleiðis lyftir og eggjar tú einstaka starvsfelagan

- Fá amboð at coacha tínar starvsfelagar
- Gerst medvitandi um, hvussu hini síggja teg, og hvussu tú ávirkar tey
- Soleiðis samskiftir tú, tá ið tú skalt eggja øðrum at gera teirra besta
- Finn javnvágina millum "písk og gularót"

16.00 Skeiðsdagurin endar

**Matarsteðgur o.a. steðgir** Fyrrapart og seinnapart eru 20 min. við kaffi/te og onkrum leskiligum. Matarsteðgur er frá 12.00-13.00

**Skeiðleiðari er Karin Jessen**, Partnari, PS4 A/S-House of Leadership. Karin er útbúgvin innan leiðslu, samskifti og sálarfrøði og hon hevur fleiri enn 25 ára royndir við menning av fólki og fyritøkum. Hon hevur arbeitt hjá Ernst & Young, har hon arbeiddi við ymiskum sløgum av fyritøkum og menniskjum. Karin er ein royndur skeiðsleiðari og hevur hon fyrr havt skeið fyri Synergi og fekk hon tá sera góðar eftirmetingar.

## DAGUR 2

08.30 Morgunbreyð við kaffi/te

09.00 Skeiðsdagurin byrjar

**Virkið samskifti er tað sama sum greið leiðsla**

- Ver medvitað/-ur um egið samskifti
- Lær at málrætta títt samskifti til ymiskar persónstypur
- Vilji til dialog er vegurin til sínamillum fatan
- Ver beinrakin og greið/-ur sum samskiftari og leiðari

**Ver betri at samskifta og at greiða frá einum boðskapi yvirfyri øðrum**

- Hvat skalt tú hugsa um, tá ið tú leggur fram fyri einum bólki?
- Soleiðis tryggjar tú, at øll hava skilt tað, sum tú sigur – og slepp undan misskiljingum
- Einføld og roynd retorisk amboð, sum tú kanst brúka í arbeiðnum
- Styrk tíni leiðsluevni við betri og greiðari samskifti

**Soleiðis handfer tú ósemjur í tínum bólki / team**

- Grundir og ávirkan – lær greitt at tulka innihaldið í ósemjum
- Vanligir tankar, kenslur og atburður í eini ósemju
- Hvussu eigur tín leiklutur vera í eini ósemju?
- Hvat skalt tú gera fyri at ósemjurnar ikki gerast størri?
- Soleiðis sleppir tú undan óttanum at fara inn í ósemjur
- Soleiðis handfer tú mótvilja, so at tað ikki avmarkar avrikið hjá øllum bólkinum
- Ymiskar ósemjur krevja ymiskar loysnir

**Soleiðis motiverar tú teg sjálva/-n og onnur**

- Hvat er tað, sum motiverar okkum?
- Hvussu vísir tú tínum starvsfeløgum hvat ið motiverar teg?
- Soleiðis motiverar tú starvsfelagarnar við at fáa tey at "eiga" uppgávurnar
- Lær, hvussu tú skapar gott lag á arbeiðsplássinum

16.00 Takk fyri hesaferð og vit síggjast aftur!

# TAÐ PRAKTISKA

| | |
|---|---|
| **Dagur:** | 16+17. september 2010 |
| **Kostnaður:** | kr. 7.999,- + mvg. pr. luttakara. Íroknað skeið, skeiðtilfar, morgunmat, frokost og kaffi í steðgunum |
| **NB!** | **Sami prísur sum í DK** |
| **Tilmelding:** | á www.synergi.fo |
| **Freist:** | **18. august 2010** |
| **Avsláttur:** | Tekna tit 3 samstundis, fáa tit 10 % í avsláttur. |

### Treytir fyri frámelding

Møgulig frámelding skal verða skrivlig og hon skal stílast til Synergi og sendast til synergi@synergi.fo, ella faxast til 322 329.

Við frámelding verður roknað umsitingargjald á 10% av fullum skeiðsgjaldi fyri hvørja frámelding – tó í minsta lagi kr. 500,-. Kemur frámeldingin seinni enn 30 dagar fyri skeiðsbyrjan verður roknað eitt gjald uppá 50% av fullum skeiðsgjaldi fyri hvørja frámelding. 21 dagar (ella seinni) fyri skeiðsbyrjan verður eingin afturgjalding. Um tær ikki ber til at vera við, so ert tú sjálvandi vælkomin at lata plássið til ein starvsfelaga.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum og møguligum broytingum í skránni. Avsláttir kunnu ikki kombinerast.